HAVNAR BÓLTFELAG
FO-110 Tórshavn, Postrúm 1333
Tlf. 314046 / Fax 318202
www.hb.fo

STOVNAÐ:
17.10.1904

FORMAÐUR:
Birgir Enghamar

MEISTARAR (17):
1955, 1960, 1963, 1964, 1965, 1971, 1973, 1974, 1975, 1978, 1981, 1982, 1988, 1990, 1998, 2002, 2003

STEYPAVINNARAR (25):
1955, 1957, 1959, 1962, 1963, 1964, 1968, 1970, 1971, 1972, 1973, 1975, 1976, 1978, 1979, 1980, 1981, 1982, 1984, 1987, 1988, 1989, 1992, 1995, 1998

GREIPUVINNARAR (11):
1955, 1963, 1964, 1971, 1973, 1975, 1978, 1981, 1982, 1988, 1998

Í 1. DEILD (61 ÁR):
1942-1943, 1945-

Í EUROPA (9):
Meistarakapping 1999/00, 2003/04, Steypavinnarar 1993/94, 1996/97, 1997/98, UEFA Cup 1998/99, Intertoto 1995/96, 2000/01, 2001/02

# Meistararnir halda steypinum

**Í HB verður sum vant miðjað høgt. Og sum tvífaldur meistari og við einum at síggja til skynsamum innkeypspolitikki, tykist føðingardagsbarnið heldur ikki hava nakra orsøk at smæðast**



*HB varð í fjør fyrsta liðið síðani GÍ í '96, sum megnaði at verja FM-heitið. Og ambitiónirnar eru ikki minni, nú 100 ára dagurin stendur fyri framman*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Jákup Mørk**
*jakup@sosialurin.fo*

Sum føroyameistari tvey ár á rað, er einki at siga til, at HB í ár verður mett sum ein av fremstu biðlunum til FM-heitið í fótbólti.

At felagið so eisini fyllir 100 ár, setir í so máta eyka krøv frá áskoðarunum, sum fegnir vilja hava nakað at feirað á føðingardegnum, og tað skal so leggjast afturat, at leiðslan í felagnum so avgjørt ikki hevur ligið á latu síðuni í so máta.

## Nýtt álop

Størstu yvirskriftirnar mundi felagið taka, tá tað í vetur stóð greitt, at álopið í eini ideal-uppstilling helst verður mannað við trimum – í HB-høpi – spildurnýggjum nøvnum. Jákup á Borg og Heðin á Lakjuni komu til úr grannunum í B36, og við besta málskjúttanum í donsku søguni hjá donsku superliguni sum leikandi venjara, tóktist missurin av Andrew av Fløtum og Tór-Ingari Akselsen til at liva við.

Síðani er Jákup á Borg tó – fyribils í øllum førum – farin til Danmarkar, men hóast hann kanska er aftur í mai mánaði, so er ein av stóru spurningunum hjá HB, hvussu stóran týdning missurin av Andrew fer at hava. Ikki bara í málskjótingini, tí har hevur HB menn at seta í mans stað, men einamest við evnum hansara til at halda upp á bóltin, soleiðis at liðið fær flutt seg niðaneftir, tá mótstøðan trýstir. Tað er ikki sterkasta síðan hjá nøkrum av nýggju álopsmonnunum, men hinvegin sýndi Rógvi Jacobsen í fjør, at hann væl kann nýtast sum tað, ið bretar kalla target-player.

## Miðvøllurin sum hjartað

Størsti spurningurin hjá HB er tó miðvøllurin. Ella skuldi mann kanska sagt, at lykilin til gullið skal finnast her. Tey bæði undanfarnu gullárini hevur miðvallarsamansetingin við Rúna Nolsøe, Halli Danielsen/Nico Dugaru og Rógva Jacobsen/Martin Christensen verið garanturin fyri at kalla allari framdrift á HB-liðnum. Við eini góðari javnvág og knallhørðum arbeiði hevur tað verið her, at HB veruliga hevur sett trýst á mótstøðuna. Tað er haðani, at flestu møguleikarnir eru sprotnir, og tað er her, at grundarlagið undir trygga verjuspælinum er skapt. Hetta seinasta tí verjan so sjáldan er komin undir veruligt trýst. Skal HB aftur í ár finna sær vegin upp á ovastu rók, so er alneyðugt, at hesin so týdningarmikli parturin av liðnum riggar til fulnar. Seinnu árini hava víst, at beinini hjá serliga Nico – men eisini Rúna og Martin – hava havt ilt við at klára eitt hart og langt kappingarár, og fella skaðar til hesarar leikarar inn samstundis, kann føðingardagurin hjá HB væl gerast minni stuttligur, enn føðingardagar flestir eru. Hinvegin kann hann eisini gerast av teimum heilt stuttligu, um hetta ikki verður støðan.

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar** | | | |
| Bárður Johannesen | 16/-16 | 1 | |
| Pól Næss Joensen | 2/-3 | 0 | |
| **Verja** | | | |
| Eli Thorsteinsson | 8/0 | 0 | |
| Janus M. Joensen | 16/0 | 0 | |
| Jan C. Dam | 10/0 | 39/1 | KÍ, B68, Herfølge |
| Símun Eliasen | 18/1 | 2/0 | ÍF, KÍ, Aarhus Fremad, Viby IF |
| Rasmus Nolsøe | 0/0 | 0 | TB |
| Hans á Lag | 10/2 | 0 | |
| Vagnur M. Mortensen | 0/0 | 0 | |
| **Miðvøllur** | | | |
| Martin Christensen (DAN) | 15/0 | 0 | Kalundborg, Glostrup IF, Holbæk |
| Kári Nielsen | 5/0 | 0 | B71 |
| Nicu Dogaru (RUM) | 10/0 | 0 | |
| Rúni Nolsøe | 17/5 | 3/0 | VB |
| Rógvi Jacobsen | 18/7 | 24/3 | KÍ |
| Emil N. Leifsson | 0/0 | 0/0 | |
| Hallur Danielsen | 17/1 | 0/0 | |
| Hendrik Rubeksen | 1/0 | 0/0 | |

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Álop** | | | |
| Jákup á Borg (læntur út til 30.05) | 0/0 | 32/1 | B36 |
| Rókur F. Jespersen | 10/2 | 0/0 | |
| Heine Fernandez (DAN) | 0/0 | 1/0 | AB, FCK, Viborg, Silkeborg |
| Heðin á Lakjuni | 0/0 | 10/1 | KÍ, B36 |
| Páll M. Joensen | 4/0 | 0/0 | |
| **Tilgongd** | | | |
| Jákup á Borg | 17/7 | | B36 |
| Heðin á Lakjuni | 18/9 | 10/1 | B36 |
| Heine Fernandez (DAN) | 0/0 | 1/0 | AB |
| Rasmus Nolsøe | | | TB |
| **Frágongd** | | | |
| Tór-Ingar Akselsen | 18/7 | 2/0 | FSV |
| Andrew av Fløtum | 14/10 | 12/1 | Fremad Amager |
| Bjarni Jørgensen | 8/1 | 0/0 | AB |
| Rani D. Christiansen | 4/0 | 0/0 | AB |
| Bergleif Sólsker | 3/0 | 0/0 | B71 |
| **Venjari** | | | |
| Heine Fernandez (DAN) | | | |



# Havnarmenn í 100 ár

**HB er annað av stóru føðingardagsbørnunum í ár. Eitt ár, sum uttan iva fer at innihalda nógvan aktivitet í Gundadali. Og vónin er, at alt hetta kann enda við 18. meistaraheitinum**

**Jákup Mørk**
*jakup@sosialurin.fo*




*HB verður heilt víst millum tey trý ovastu, og persónliga er tað mín fatan, at tað aftur í ár fer at standa millum havnarfeløgini, tá meistaraheitið skal gerast av, heldur Gunnar Mohr, sum í nógv gjørdi mál fyri HB*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

»Ein maður er ein maður, og ein Mohr er sgu' ein Mohr«

Soleiðis sang góði gamli Kalle Mohr á fløguni, sum Pipar & Salt gav út fyri nøkrum árum síðani, og fyri ein ávísan part er tað í øllum førum ein sannroynd, at eitur tú Mohr, so heldur tú við HB. Heilt rætt er hetta tó ikki., tí Mohar'arnir finnast so eisini í B36, men hjá Gunnari Mohr er tó eingin ivi. Har er tað HB, sum telir.

– Ja, tað er eitt sindur spell, at B36 soleiðis skal hava frelst ein part av familjuni yvir til sín, men tað má mann so bara liva við, tekur hann skemtandi til, tá vit spyrja hann, um útsøgnin hjá Kalla nú eisini er ævigi sannleikin.

## Fyllir nógv

Men at Gunnar sjálvur er HB'ari, er so eingin ivi um. Sjálvur taldist hann í nógv millum tey aktivu í felagnum, og tað gjørdist til hópin av dystum við nógvum málum á besta mansliðnum í felagnum, og so sanniliga eisini til eitt óvæntað come-back fyri trimum árum síðani.

Hartil var hann eitt skifti eisini leikandi formaður í felagnum, og í dag situr hann sjálvur triði í nevndini, sum skal syrgja fyri, at 100 ára dagurin hjá felagnum skal ganga fyri seg í stórum stíli.

Ofta verður tikið til, at viðhaldsfólk í ítrótti eru nakrir serskøltar, og sum so ber Gunnar seg heldur undan, at vera ein slíkur. Men tá vit spyrja hann, hvat tað er, at vera HB'ari, er hann tó eitt sindur ivasamur.

– Eg veit ikki, hvussu eg skal svara, men tað er í øllum førum spennandi. Og tað er so eisini nakað, sum altíð hevur fylt hampuliga nógv í mínum lívi. Kanska serliga fyrr, tá mann eisini var á vøllinum, men tó at tíðin til familju og annað er vorðin nakað betri nú, so er tað framvegis nakað, sum hevur stóran týdning hjá mær. Øðrvísi enn tað dugi eg ikki lýsa tað.

## Kanska Liverpool

Hinir báðir í nevndini eru Hans Waag og Rói Egholm, og tó at eingin teirra er formaður, so er tað so fallið Gunnari í lut at úttala seg í samband við útgávuna av hesum blaðnum.

Og tað stendur skjótt greitt, at hesir ikki hava ligið á løtu síðuni, nú teir í gott ár hava verið í rundu nevndini.

Kanska størsta samrøðuevni millum viðhaldsfólk hjá HB hevur verið ætlaður dystur móti enska Liverpool, og tað er einki at ivast í, at arbeitt hevur verið bæði væl og leingi við hesum. Enn vil Gunnar tó ikki siga nakað sum helst um, hvørt hetta verður til nakað, men hinvegin er longu greitt, at ein dystur móti FCK í øllum førum verður partur av skránni.

Hartil standa eisini onnur tiltøk á skránni. Ein fløga verður í skrivandi løtu gjørd til reiðar í Danmark, og skuldi hon gjarna verið á gøtuni, tá lesarin situr við blaðnum. Útvarpsmaðurin, Suni Merkistein, er í holt við at skriva eina bók um seinnu hálvt hundrað árini av felagslívinum hjá HB, eftir at starvsfelagi hansara, Jógvan Arge, ritstjórnaði bókini um tey fyrstu 50 árini. Og so verður talan sjálvandi eisini um eina rimmar veitslu í oktober mánaði, har allir rættiligir HB'arar fara í føðingardagin.

Fyri tey yngru fara eisini ymisk tiltøk at vera á skránni gjøgnum árið. Tiltøk av ymsum slag fara at standa á skránni, og væntandi verður talan eisini um onkra serstaka kapping, tá vit koma út á heystið, og sum heilt tykist tað vera ætlanin, at føðingardagurin skal markerast bæði væl og virðiliga.

## Kunnu yvirhála KÍ

Og tað er einki at ivast í, hvør besta føðingardagsgávan hjá felagnum vildi verið. Nýggja búmerkið, sum skal nýtast hetta árið, inniheldur millum annað seytjan stjørnur. Hesar ímynda tey seytjan meistaraheitini hjá felagnum, og er hetta sama tal, sum klaksvíkingar eiga. Ein átjanda stjørna vildi helst verið júst tað ískoytið til føðingardagin, sum øll í tí reyð/svara húsinum høvdu ynskt sær, og í øllum førum tykist hetta vera tað, sum Gunnar Mohr ynskir sær mest av øllum.

– Tað vóna vit í øllum førum. Tað at fara framum KÍ hevur altíð verið nakað, sum øll í HB hava strembað eftir, og í fjør komu vit so ájavnt teimum. Høvdu vit á sjálvum 100 ára degnum kunna farið framvið teimum, so vildi tað verið heilt fantastiskt, heldur Gunnar.

Og hann heldur eisini, at HB hevur nakað at hava vónirnar í.

– Nú verða tað so ikki vit einsamallir, sum gera av, hvar vit enda. Tað eru jú níggju onnur lið, sum eisini fegin vilja enda ovast. Men eg haldi so í øllum førum, at vit hava góðar møguleikar. HB verður heilt víst millum tey trý ovastu, og persónliga er tað mín fatan, at tað aftur í ár fer at standa millum havnarfeløgini, tá meistaraheitið skal gerast av, heldur hann.

– Men hvussu er og ikki, so skulu vit í øllum førum hava ein góðan føðingardag. Tað er so heilt víst, staðfestir Gunnar Mohr.

### Metingin

Skal HB aftur í ár gera seg galdandi í oddinum, er alneyðugt, at miðvøllurin riggar til fulnar. Skaðar hjá Rúna Nolsøe, Nico Dogaru og Martin Christensen kunnu vera størsti snávingarsteinurin hjá liðnum, sum í allar mátar tykist hava sterkasta hópin í landinum.